# Dammurin aftur í hitanum

*Jan Dam vil hava landsliðsplássið aftur, og veteranurin veit, at nú skal meiri til at hanga í, enn tað skuldi, tá hann var yngri*



*Jan Dam, sum á myndini er í dysti fyri barndómsfelagið, HB, hevur nú sett sær fyri at vinna landsliðsplássið aftur*

Í fjør heyst datt Jan Dam út úr átjan manna landsliðshópinum. Tí kom tað eitt sindur óvart á hann, at venjarin vildi hava hann við niður til Spania. Men Jan Dam hevur í vetur arbeitt miðvíst fyri at koma upp í part aftur:

– Eg havi ítrótt á linju á læraraskúlanum, og so havi eg eisini runnið nógv sjálvur. Tá vit vóru saman í tveimum vikuskiftum á Svangaskarði, kendi eg meg væl, og tað man venjarin eisini hava hildið.

Og nú ætlar tú at halda tørn um landsliðsplássið?

– Eg vil fegin spæla fleiri landsdystir. Nú eri eg 31 ára gamal, og so er eingin tíð at spilla burtur. Í síðstu undankappingini var eg nógv skaddur. Tað kanst tú ikki tryggja teg ímóti, men er venjingarstøðan góð, so er sannlíkið fyri skaðum minni.

Jan Dam hevur enn eina ferð sagt barndómsfelagnum HB farvæl. Nú spælir hann fótbólt á Toftum, og hann heldur, at tað styrkir um møguleikan at vera á landsliðnum:

– Nýggjar avbjóðingar kveikja hugin at halda fram. Vit í HB sóu hetta ógvuliga væl, tá Allan Mørkøre kom úr Klaksvík og til okkara. Eg vóni, at bæði B68 og eg sjálvur fáa gagn av samstarvinum okkara millum.

### Eitt sindur tyngdur

At Óli Johannesen var darvaður av skaða gjørdi, at Jan Dam fekk møguleikan á aftasta manni ímóti Finnlandi. Hann hevði ikki verið á landsliðnum, síðani hann var liðformaður í stórtapinum í Estlandi í fyrraárið:

– Venjarin segði mær, at hann hevði álit á mær, tí hann helt, at tað hevði gingið væl undir venjingini. Eg skal ikki dylja, at eitt sindur av fjáltri var á fyrstu minuttirnar móti Finnlandi, men tað var skjótt, at alt var, sum tað plagar at vera.

Jan Dam spældi allar 90 minuttirnar móti Finnlandi, men móti Íslandi tók hann seg úr slagnum í steðginum:

– Longu tá eitt korter var farið, fekk eg eitt dygt spark. Tað var orsøkin til, at eg fór út.

Tú gjørdi eitt brotsspark?

– Fyri dystargongdina var tað sera harmuligt, at teir fingu høvi at minka um munin fyri steðgin. Í sovornum førum spælir tú støðuna umaftur og umaftur í høvdinum. Brotið varð gjørt dygst úti við brotsteigarmarkið, og sjálvsagt harmar tað meg, men eg fari ikki at siga, at dómurin ikki var rættur.

Íslendingar javnaðu til 2–2 tólv minuttir eftir steðgin, og tá var aftur brotsspark. Ta ferðina var tað Jens Kristian Hansen, sum fór eitt sindur skeivur av einum bólti, og síðani feldi ein íslending.

– Rikhardur Dadason skoraði uppá bæði brotsspørkini. Hann var í álopinum og var sera sterkur, skjótur og nærgangandi, sigur Jan Dam.

Tá Ísland miðskeiðis í 2. hálvleiki skoraði sigursmálið var talan um uppspæl eftir miðásinum.

– Allan 2. hálvleik var heilt týðuligt, at teir vóru betri fyri, enn vit vóru. Okkara menn orkaðu ikki at bjóða seg til, og teir, sum høvdu bóltin, orkaðu ikki annað enn at senda langt fyri at fáa luft, og so mátti tað enda galið, er metingin hjá Jan Dam.

– Vit høvdu tveir góðar møguleikar at javna. Óli Johannesen sendi eitt rimmar fríspark móti málinum, og beint fyri leiklok tóktist Heðin á Lakjuni ikki at vita, hvussu leysur hann var.

### Perlur

Tá tað kemur til føroyska álopsspælið, var tað serliga í 1. hálvleiki. Og sambært Jan Dam vóru bæði málini sannar perlur:

– Málið hjá Kurt Mørkøre var eitt fantastiskt mál. Todi var um at gerast leysur, men valdi at spæla út í vinstru. Bólturin rakti í ein mótstøðumann. Haðani støkk hann til Kurt Mørkøre, sum var staddur á brotsteigarlinjuni, tá hann við vinstra beini heilfluktaði í kassan. Eitt fínt mál.

Og tá tit komu framum 2–0?

– Allan Mørkøre sendi langt fram. Todi snittaði í høgru bóltin fram um ein mótstøðumann, og so fór hann sum ein rakett frá honum. Tá hann kom inn móti málteiginum smekkaði hann inn við nærra stólpanum. Eg helt, at bólturin fór skeivu megin stólpan, men talan var um eitt fínt mál. Todi hevði trupulleikar við lærinum fyrstu dagarnar har niðri (og ikki rygginum, sum vit hoyrdu úr Spania, blm.), men tá hann kom fyri seg og vandi við, var tað tyðuligt, at hann er sera væl fyri, og eg rokni við, at talan verður um eitt heilt gott kappingarár hjá honum.

### Trý tepur tap

Hetta var triðja ferðin, at Jan Dam spældi móti Íslandi, og hvørja ferð hevur tapið verið við einum máli:

– Í Höfn 27. juli í 1997 var tað harmuligt, tí tá skoraðu teir í yvirtíðini. Hesa ferð var tað sera harmuligt, tí vit høvdu gott tak á teimum og fingu tvey mál burturúr. Í steðginum fingu teir ein orduligan vals frá venjaranum, og hugburðurin hjá teimum var øðrvísi í 2. hálvleiki, tá tað kom væl til sjóndar, at teir vóru betri fyri, sigur Jan Dam, sum í tí fyrsta av teimum 38 landsdystunum skoraði einasta landsliðsmálið. Tað var 8. august í 1990 í Gundadali móti Íslandi. Ta ferðina skoraði hann uppá brotsspark til 2–2.

Føroyingar hava nú spælt seks ferðir móti Íslandi. Í 1–0 tapinum í fjør var Jan Dam ikki í hópinum. Í 1988 var eingin HB maður við í Íslandi, tí teir spældu móti Brøndby (tá var Jan Dam ikki komin í landsliðshópin). Tá føroyingar 2. juli í 1995 taptu 2–0 í Neskaupsstaði, var Jan Dam heldur ikki við:

– Minn meg ikki á tað. Tá vóru vit við HB í Tromsø, har vit taptu stórt í Intertoto!

JH

### Føroyar–Ísland 2–3 (2–1)

Í La Manga í Spania fríggjadagin 4. februar 2000, kl. 14.00

**Dómarakvartett:** Rune Pedersen, Noreg, Bo Blankholm Pedersen, Danmark, Finn Erik Rasmussen, Danmark og Nicolai Vollquartz úr Danmark

**Áskoðarar:** 150

1–0: Kurt Mørkøre 19
2–0: Todi Jónsson 37
2–1: Rikhardur Dadason br 40
2–2: Rikhardur Dadason br 57
2–3: Bjarki B. Gunnlaugsson 68

**Føroyar:** 1. Jens Martin Knudsen, Ayr United – 2. Óli Johannesen, AGF, 15. Jan Dam, B68 (4. Jóhannus Joensen, HB, 46.), 3. Jens Kristian Hansen, liðformaður, Ayr United – 6. Henning Jarnskor, GÍ, 9. Allan Mørkøre, ÍBV (7. Sámal Joensen, GÍ, 67.), 17. Fróði Benjaminsen, B68 (13. Rógvi Jacobsen, KÍ, 76.), 8. Julian Johnsson, Sogndal, 5. Øssur Hansen, B68 – 18. Kurt Mørkøre, Sogndal (14. Heðin á Lakjuni, KÍ, 76.), 10. Todi Jónsson, FCK

Á beinkinum uttan at verða skiftur inn: 16. Sunvard Joensen, GÍ

Gult kort: Øssur Hansen 17. og Rógvi Jacobsen 84.

Venjari: Allan Simonsen

Uni Arge og Jákup á Borg vóru so mikið skaddir, at teir vóru ikki á beinkinum

**Ísland:** 1. Birkir Kristinsson, ÍBV (12. Arni Gautur Árason, Rosenborg, 46.) – 2. Auðun Helgason, Viking Stavanger, 6. Rúnar Kristinsson, Lilleström, 7. Tryggvi Guðmundsson, 8. Helgi Kolviðsson, Mainz, 11. Rikhardur Daðason, Viking Stavanger (18. Haukur ingi Guðnason, Liverpool, 84.), 13. Einar þór Danielsson (21. Indriði Sigurðsson, Lilleström, 31.), 15. Arnar þór Viðarsson, Lokeren, 17. Ólafur Örn Bjarnason, Malmö (16. Sigurður Örn Jónsson, KR, 75.), 19. þórhallur Hinriksson, KR, 22. Bjarki B. Gunnlaugsson, Preston (5. Sverrir Sverrirsson, Fylkir, 88.)

Gult kort: Bjarki B Gunnlaugson 27

# Enn ein rumena

*Havnar Bóltfelag fær í næstum enn ein rumena í leikarahópin*

JÁKUP MØRK

Fyri stuttum varð ein rumenskur álopsleikari limaður inn í leikarahópin hjá HB, og í næstum kemur ein landsmaður hansara til landið.

Talan er um ein 24 ára gamlan verjuleikara, sum frammanundan hevur leikt við Univers Craiova, sum er við í fremstu rumensku fótbóltsrøðini.

HB hevur sum kunnugt mist nógv fólk í mun til seinasta kappingarár, og millum annað man saknurin í Hans Fróða Hansen vera sera stórur. Við nýggja leikarunum vónar HB, at stykja munandi um verjupartin.

# Nógv eygu fylgdu við

*Landsdystirnir í Spania vóru ein rættuligur sýnisgluggi fyri føroysku spælararnar*

Dreymurin hjá nógvum ungum fótbóltsspælarum er at sleppa út um landoddarnar at gera frítíðarítrivið til livibreyð. At tað í níti árunum hevur eydnast hjá einum tíggju føroyskum spælarum at koma so mikið langt hevur givið yngri monnunum blóð á tonna.

Landsliðsferðin niður til Spania var eitt gott høvi hjá føroysku spælarunum at gera seg kendar. Øll tey norðurlendsku landsliðini vóru har, og tey drógu nógv fólk aftaná sær. Í síðstu viku vóru heili hundrað norðurlendsk pressufólk í La Manga. Har vóru eina staðni ímillum tíggju og fimtan persónar, sum hava tað til vinnuveg at keypa og selja spælarar, og umleið tredivu fótbóltsfeløg aðra staðni enn úr norðurlondum høvdu umboðsmenn í La Manga í síðstu viku.

Tá vit hava spurt okkum fyri, um serligur áhugi hevur verið frá útlendskari síðu fyri nøkrum av føroysku spælarunum, hevur eingin dugað at sagt frá nøkrum. Kortini man einki vera at ivast í, at nøvnini á onkrum føroyskum spælarum – eftir altjóða alini eru teir sera bíligir – eru komin í svørtu bøkurnar kring Europa.

JH



# Fróði nærri føstum plássi

*Landsliðsferðin í Spania vísti, at tað í ár verður størri kapping um tey fyrstu ellivu plássini, enn tað nakrantíð áður hevur verið*

Tá tað plagar at verða mett um hvørjir ellivu skulu vera á vøllinum frá fyrsta bríksli, tá landsliðið skal í eldin, so hava royndirnar víst, at ivi hevur bara verið um eitt og onkuntíð tvey pláss.

Talið á spælarum, sum hoyra til hópin, er umleið tað sama, sum tað hevur verið árini frammanundn. Men landsliðsferðin til Kekkia í oktober og ferðin til Spania í síðstu viku hava víst, at nú eru tað fleiri um boðið at vera ímillum teir fyrstu ellivu, enn tað frammanundan hava verið.

Allan Simonsen hevur fleiri ferðir sagt, at honum líkar best at hava spælarar, ið eru førir fyri at spæla á fleiri plássum. Allir teir útispælararnir, sum nú eru í landsliðshitanum, hava royndir í at spæla í fleiri plássum.

### Verjan

Jens Martin Knudsen spældi fríggjadagin fyri 49. ferð í altjóða skrásettum landsdysti. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað er møguleiki fyri, at hann – sum tann fyrsti – fer at runda teir fimti landsdystirnar seinni í ár. Um hetta skal gerast veruleiki er treytað av, um Allan Simonsen velur veteranin framum Jákup Mikkelsen. Venjarin plagar at siga, at hann hevur tveir eins góðar málverjar.

Í miðverjuni vóru tveir spælarar burturfrá hesa ferð – Hans Fróði Hansen og Pól Thorsteinsson. Tvey tey seinastu árini hevur venjarin – tá møguleiki hevur verið fyri tí – hildið seg til Hans Fróða Hansen, Óla Johannesen og Jens Kristian Hansen. Hesa ferð vísti venjarin, at hann hevur ikki avskrivað Jan Dam.

Venjarin plagar at siga, at hann fegin vil hava fótbóltsspælarar á øll plássini á liðnum, og hesa ferð royndi hann Jóhannes Joensen í miðverjuni.

Tað hevur ljóðað, at venjarin kundu hugsað sær at sæð Rógva Jacobsen í tí fyri hann óroynda leiklutinum sum miðverji, men henda royndin varð ikki gjørd í Spania. Pól Thorsteinsson er leikbannaður alt hetta árið, og tí kunnu vit staðfesta, at evnini til miðverjuna verða Óli Johannesen, Hans Fróði Hansen, Jens Kristian Hansen, Jan Dam, Jóhannes Joensen og so Kurt Mørkøre. Ein annar møguleiki er Fróði Benjaminsen, sum fleiri ferðir hevur spælt á hesum plássinum í B68.

### Vongverjarnir

Tá landsliðið í heyst fór til Kekkia, roknaði Henning Jarnskor við, at hann skuldi sita á beinkinum frá fyrsta bríksli. Tað kom óvæntað á hann, tá venjarin segði honum, at hann – og ikki Øssur Hansen – skuldi vera vongverji í vinstru. Venjarin mintist, at GÍ maðurin hevði spælt væl í hesum plássinum undir stórum trýsti í Jugoslavia í 1996. Henning stóð seg væl í Prag, og í Spania vísti venjarin, at hann roknar Henning fyri meiri enn ta ífylluna í hópinum, sum tað onkra ferðina í fjør kundi tykjast, at hann skuldi vera, tá Pól Thorsteinsson ella Allan Mørkøre røktu vongverjan í høgru, og Øssur Hansen og John Ryan stríddust um plássið í hinum borðinum.



*Fróði Benjaminsen er nú av álvara farin at banka upp á landsliðsdyrnar*

Venjarin hevur stórt álit á Øssuri Hansen, og tá John Ryan ikki vil vera við á landsliðnum, so eru Øssur og Henning bestu boðini uppá vongverjar. Jóhannes Joensen og Heðin á Lakjuni eru aðrir møguleikar, og so er spurningurin, hvar venjarin ætlar at brúka Allan Mørkøre, sum ikki spældi 1. hálvleik ímóti Finnlandi, tí hann var ikki heilt klárur.

### Miðvøllurin

Tá Sámal Joensen, John Petersen og Julian Johnsson allir hava verið tøkir, hevur Allan Mørkøre fleiri ferðir verið vongverji. Tá John Petersen ikki var við í Spania var kanska upplagt, at hinir tríggir her nevndu vóru á miðvøllinum, men hesa ferðina troðkaði ein nýggjur maður seg fram í kappingini um miðvallarplássini.

Longu í heyst – í heimadystunum ímóti Íslandi og Litava – fekk Fróði Benjaminsen spælitíð. Tá landsliðið fór til Kekkia, gav B68 maðurin avboð, og venjarin duldi ikki, at hann harmaðist um hetta. Allan Simonsen plagar ikki at siga so nógv um sínar ætlanir, men ta ferðina segði hann, at hann hevði umhugsað at latið Fróða Benjaminsen verið ímillum teir fyrstu ellivu. Hesa ferð spældi Fróði Benjaminsen á miðvøllinum bæði ímóti Finnlandi og Íslandi, og hann má nú metast at standa sterkur í kappingini um pláss ímillum teir fyrstu ellivu.

Ímóti Finnlandi kom Allan Mørkøre inn fyri Jóhannes Joensen, sum hevði verið miðverji. Tá Allan kom inn, fór Sámal Joensen aftur á miðverjan, har hann ongantíð hevur spælt áður, og Allan kom inn á miðvøllin.

### Álopið

Nú er tað langt síðani, at landsliðið bara spældi við einum manni frammi. Tað er ikki komið fyri síðani í útidystinum niðri í Bosnia 19. august í 1998. Ta ferðina var Uni Arge einsamallur á toppinum fyrstu 78 minuttirnar, og so varð hann avloystur av Jákupi á Borg, meðan John Petersen alla tíðina var framrættaður miðvallari.

Todi Jónsson (var ikki við í Bosnia, tí hann var skaddur) hevur verð sjálvskrivaður sum fyrsta val í álopinum øll árini, sum Allan Simonsen hevur havt ábyrgdina av liðnum. Í Spania spældi hann saman við Kurt Mørkøre, og í fjør spældi hann saman við Jákupi á Borg, Una Arge og John Petersen, sum var í álopinum í Prag.

Tað verður ímillum hesar fýra, at makkarin hjá Toda Jónsson skal finnast í ár. Rógvi Jacobsen og Heðin á Lakjuni hava sneytað til landsliðið fýra ferðir í part. Nógvur eru um boðið, og tí verður tað framvegis fyrsta takið hjá teimum at sleppa uppí part ímillum teir átjan, ið manna hópin. Hvussu nógva spælitíð, teir fara at fáa, verður treytað av, hvørjir av hinum monnunum fara at verða tøkir.

JH



Komandi tíðin fer at vísa, um tað skal eydnast Jens Martini at røkka teimum hálv hundrað landsdystunum.

## Gamlir liðfelagar funnu væl saman

*Knøpp tíggju ár vóru ímillum tey bæði landsliðsmálini hjá Kurt Mørkøre, og Todi Jónsson var farin ellivu ferðir av vøllinum uttan at skora, áðrenn tað eydnaðist hesa ferð*

Báðir teir føroysku málskjúttarnir ímóti Íslandi fríggjadagin høvdu áður roynt at skora fyri Føroyar, men um teir meiri ella minni høvdu gloymt kensluna av at skjóta mál á landsliðnum, so var tað kanska einki at siga til, tí hjá báðum hevði tað verið málleyst rættuliga leingi.

Allan Simonsen hevði ætlað, at Uni Arge í útgangsstøðuni skuldi vera í álopinum saman við Toda Jónsson. Men fótskaðin, sum Uni Arge (og ikki Julian Johnsson, sum vit frættu úr Spania hósdagin) fekk undir venjing hósmorgunin, darvaði so mikið, at Uni Arge helt seg ikki til at spæla. Jákup á Borg var frammanundan so mikið skaddur, at hann ikki fekk spælt.

So hevði Allan Simonsen valið ímillum tríggjar klaksvíkingar til álopsplássið, og hann valdi Kurt Mørkøre framum Rógva Jacobsen og Heðin á Lakjuni.

### Fyrstu ferð

Kurt Mørkøre og Todi Jónsson høvdu frammanundan verið á landsliðnum saman ellivu ferðir. Men hetta var fyrsta ferðin, at teir báðir mannaðu álopsplássini í senn.

Kurt verður 31 seinni í hesum mánaðinum, og Todi varð 28 í síðstu viku. Men hóast aldursmunin, so vóru teir ofta á sama liði í yngru deildunum hjá KÍ. Tá var Kurt ofta í álopinum, meðan Todi var miðvallari. Teir vóru saman á liðnum, sum í 1991 vann FM. Tá var Kurt fyri tað mesta aftasti maður í verjuni, meðan Todi var á miðvøllinum.

Vit skilja á teimum, sum sóu dystin ímóti Íslandi, at innanhýsis fatanin var góð ímillum teir báðar.

### Bíðaðu leingi

Kurt Mørkøre hevur eina ferð áður skorað á landsliðnum. Tað var í Gundadali mikukvøldið 8. august í 1990. Ta ferðina legði hann Føroyar framum 1–0 ímóti Íslandi. Úrslitið ta ferðina var, at Ísland vann 3–2. Fríggjadagin – knøpp tíggju ár og eftir at Kurt hevði spælt 23 landsdystir uttan at skora mál – legði Kurt Mørkøre Føroyar framum 1–0 ímóti Íslandi. Aftur hesa ferð varð úrslitið 3–2 til Ísland.

Todi Jónsson hevði frammanundan fríggjadegnum skorað átta landsliðsmál. Hetta var fyrsta ferðin, at hann skoraði ímóti Íslandi. Í gott og væl fýra ára tíðarskeiðnum frá tí at Todi skoraði fyrsta landsliðsmálið ímóti Turkalandi í 1991, og til hann skoraði ímóti Russlandi í 1995, spældi Todi átjan ferðir á landsliðnum uttan at gera mál.

Áttanda málið skoraði Todi ímóti Malta á Svangaskarði 8. juni í 1997. Síðani tá hevur toppskjúttin spælt ellivu landsdystir, uttan at tað hevur eydnast at gera mál (hann hevur fingið trý brotsspørk, sum, tíverri, bara hava givið eitt mál).

Mikudagin í síðstu viku hevði Todi føðingardag. Tá góvu føroyingarnir í Spania honum ein revolvara, tí teir vildu hava hann at venja í at miðja eftir málinum, og vit kunnu bara staðfesta, at longu fríggjadagin fruktaði. Og so mugu vit vóna, at neyvleikin verður eins stórur, tá Morten Olsen kemur við sínum monnum til Føroya í august, og ikki minst tá tað í september verður farið undir HM undankappingina.

### Sjáldan fleiri mál

At føroyingar skora tvey mál kemur ikki fyri á hvørjum ári. Landsdysturin ímóti Íslandi var nummar 65, og hetta var tíggjunda ferðin, at føroyingar megnaðu at skora fleiri enn eitt mál. Tað er merkisvert, at tað hevur bara eydnast at vunnið fimm av hesum tíggju dystunum: tvær ferðir ímóti Malta, tvær ferðir ímóti San Marino og eina ferð ímóti Estlandi.

Tvær ferðir ímóti Íslandi, eina ferð ímóti Russland og eina ferð ímóti Spania hevur landsliðið skorað tvær ferðir og alíkavæl tapt. Ímóti Estlandi endaði tað fyri fýra árum síðani 2–2.

Tað er bara eina ferð áður komið fyri, at báðir álopsmenninir hava skorað í sama dysti. Tað var á heimavølli 8. juni í 1997 ímóti Malta. Føroyar vunnu 2–1, og Uni Arge og Todi Jónsson mannaðu álopsplássini og skoraðu hvør sítt mál.

JH